# Kvøldskrá

**Á Handilsskúlanum á Kambsdali**

**Innskrivingarseðil, heysthálvan 2002**

| | |
|---|---|
| Navn: | |
| Føðingardagur: | |
| Gøta: | |
| Postnr./bygd: | |
| Starv/arbeiðspláss: | |
| Tel. heima: | Tel arb.: |
| Teldupost adr.: | |

**FHS-stakroyndir:** (setið x)
Virkisbúskapur C Týsd. 18.00 - 19.30 og
Hósd. 19.40 - 21.10 ☐
Kunningartøkni C Týsd. 19.40 - 21.10 og
Hósd. 18.00 - 19.30 ☐
Próvtøkur í mars/apríl 2003

**HH-stakroyndir:**
Virkisbúskapur B Týsd. 16.00 - 17.30 ☐
Kunningartøkni B Hósd. 18.00 - 19.30 ☐
Próvtøkur í mars/apríl 2003

**Merkonom:**
Ársroknskapur* Mánad. 18.00-20.30 ☐
Innkeyp* Týsd. 18.00-20.30 ☐
Marknaðarførsla* Týsd 18.00-20.30 ☐
Virkisbúskapur* Mikud. 18.00-20.30 ☐
* 45 tíma lærugrein. Próvtøka í desember 2002.

**Kostnaður:**
Depositum: 250,00 kr. fyri hvønn luttakara
Stakroynd, luttøkugjald: 300,00 kr. fyri hvørja stakroynd
Merkonom, luttøkugjald: 400,00 kr. fyri 45 tíma-lærugrein.

Í nøkrum merkonomlærugreinum eru umframt vanligu fortreytirnar eisini serligar fortreytir galdandi:
- Í ársroknskapi krevst at tú hevur verið teknaður til undirvísing og verið til próvtøku í Virkisfyri-skipan
- Í Virkisbúskapi krevst kunnleiki til roknskap svarandi til 30 tíma undirvísing.

Dagur,undirskrift

Ivast tú, ring og spyr eftir lestrarvegleiðara. Fleiri upplýsingar um merkonomútbúgvingina eru at finna undir útbúgvingar á www.hsh.fo

Innskrivingarfreistin til kvøldskúlan er **1. juli. 2002.**
Skúlagongdin byrjar í viku 36. Fyrivarni verður tikið fyri møguligum broytingum. Øll undirvísing er treytað av nóg góðari undirtøku.

**FØROYA HANDILSSKÚLI**
Kambsdalur · 530 Fuglafjørður
Tel. 444 900 · Fax 444 901
Teldupost adr: fh@kambsdal.olivant.fo

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Avloysarastarv

Á Dómaraskrivstovuni verður søkt eftir fólki við hollari skrivstovuútbúgving, 28 tímar um vikuna, frá 1. juli 2002 til 10. januar 2003.

Viðkomandi verður settur sambært felagssáttmála millum Statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/STAT og Finansministeriet.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Kathrinu Magnussen, skrivstovuleiðara, tlf. 31 10 03.

Umsóknir, prógv og møgulig viðmæli verða at senda Dómaraskrivstovuni í seinasta lagi 17. juni 2002.

**Sorinskrivarin í Føroyum,**
tann 10. juni 2002
Jørgen B. Petersen, adm.

# Sp/f Føroya Bjór – Avgreiðslan í Tórshavn í likvidatión

Sagt verður við hesum frá, at Sp/f Føroya Bjór – Avgreiðslan í Tórshavn (Sp/f nr. 1474) á aðalfundi hin 6. juni 2002, avgjørdi at fara í sjálvboðna likvidatión við undirritaða, Petur Even Djurhuus, advokati, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, sum likvidator.

Vísandi til ásetingarnar í grein 92 í smápartafelagslógini, verður við hesum heitt á kravánarar felagsins um, yvirfyri undirritaða, at fráboða møgulig krøv við nærri skjalaprógvførslu fyri hesum.

**Sp/f Føroya Bjór – Avgreiðslan í Tórshavn í likvidatión**
**v/ Petur Even Djurhuus likvidator**
Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn
tlf. 311260 · telefax 311261

**Advokatfelagið**
Yviri við Strond 4 · Boks 359
FO-110 Tórshavn
Tlf. 311260 · Fax 311261
Telefontíð: 9³⁰-12⁰⁰ og 13⁰⁰-16⁰⁰

| | |
|---|---|
| Tórmóður Djurhuus, adv. | Dánjal Magnussen, adv. |
| Jógvan Páll Lassen, adv. | Petur Even Djurhuus, adv. |
| Jógvan E. Ellefsen, adv. | Anna Dam, adv. |
| Ingi Højgaard, adv. | |

# Servitrisur og barrvørðar

Søkt verður eftir servitrisum og barrvørðum í summar.

MARCO POLO
Tlf. 313430 / 213430

# Vaskifólk søkist

Søkt verður við hesum eftir vaskifólki at byrja 15. august at gera reint 6 tímar um vikuna á Kommunuskrivstovuni og í Spælistovuni hjá Dagrøktarskipanini.

Skrivlig umsókn skal vera Kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi týsdagin 25. juni 2002.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til kommunuskrivaran tlf. 441179.

**Skála kommuna**

# Almanna- og heilsuútbúgvingin í Suðuroy

**800 Tvøroyri**

søkir eftir áhugaðum tímaløntum lærarum at undirvísa heilsuhjálparanæmingum. Tú skalt hava eina miðallanga framhaldsútbúgving, sum er viðkomandi fyri útbúgvingarnar, t.d. sjúkrasystir, fysio-/ergoterapeut e.l.

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi og mennandi starv, har tú kemur at arbeiða sjálvstøðugt í tímarí undirvísing. Undirvísingin er løgd til rættis sum toymisarbeiði og sum verkætlanir, í tøttum tvørfakligum samstarvi ímillum lærararnar á skúlanum.

Undirvísingin tekur støði í 5 yrkislærugreinum, ið eru tann: handaliga, mentanarliga, virksemisskapandi, námsfrøðiliga/sálarfrøðiliga, almanna/samfelagsliga og røktarliga yrkislærugreinin, við 20% úr hvørjari grein.

Á skúlanum starvast frammanundan ein sjúkrasystir, ein kostráðgevi og ein fysioterapeutur.

Áhugað kunnu venda sær til skúlan á tlf. 372855, Susanne Høgh Olesen, deildarleiðara, skjótast gjørligt.

FA. GRAVSTEINAR




Opið: mánadag - fríggjadag 9⁰⁰-17⁰⁰
annars sambært avtalu.
Vøruskrá kann fáast!



# Størv leys at søkja

**Toll- og Skattstova Føroya**

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskatta-lógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Í Streymoyar øki starvast 60 fólk. Høvuðsskrivstovan er á Smyrilsvegi, Posttolldeildin, har viðkomandi koma at starvast, heldur til á Óðinshædd og Tollbúðin er á Eystaru Bryggju.

Heimasíða
www.tollskatt.fo

E-mail
streymoy@tollskatt.fo

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, eru tvey størv leys at søkja til setan á **Posttolldeildini** so skjótt til ber.

Talan er um føst størv fulla tíð, tó kann annað møguliga vera niðursett tíð.

Í báðum førum umfatar starvið kannan og edv-viðgerð av tollingaráheitanum og annað arbeiði í sambandi við tollavgreiðslu.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar við skrivstovuútbúgving og/ella royndum innan tollarbeiði hava fyrimun.

Harumframt skulu nýggju fólkini vera fyrikomandi og arbeiðssom og kunna arbeiða sjálvstøðugt.

**Vit kunna bjóða**
Spennandi størv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini eru fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving, v.ø.o. tvey sjálvstøðug størv í góðum arbeiðssumhvørvi.

**Setanartreytir**
Løn- og setanarviðurskifti, sum er treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Núverandi setanarøkið er Streymoyar øki, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí, og tey, ið sett verða, skulu kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Nærri frágreiðing fæst við at venda sær til Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, Herman í Stórustovu á tlf. 31 02 60, lok. 156.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

**27. juni 2002**

Toll- og Skattstova Føroya, Streymoyar øki
Postsmoga 3139
110 Tórshavn

Stigar til endamálið
- stórt úrval




Gávubúð · Náttúrudeild · Leikur
THOMAS DAM Á HÁLSI
Heykavegur 3 • 100 Tórshavn • Tel. 311400 • Fax 315574
th-dam@post.olivant.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3311, Sp/f NyZac, 435 Streymnes.

Viðtøkur broyttar: 20.02.2002 og 17.05.2002.
Nýgg adressa: 740 Hvannasund
Nýggjur heimstaður: Hvannasunds Kommuna
Nýggj hjánøvn: Sp/f Undirhald (Sp/f NyZac), Sp/f Games (Sp/f NyZac), Sp/f Chat (Sp/f NyZac), Sp/f Beaver (Sp/f NyZac) og Sp/f Spøl (Sp/f NyZac)
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Sigvaldur Zachariasen, 435 Streymnes.

Skráseting Føroya tann 13. juni 2002

Kristin Balle

Handilsskúlin á Kambsdali søkir eftir

# TÍMALÆRARUM

frá 1. august 2002. Um rætti umsøkjari við rætta førleika og røttu lærugreinasamanseting søkir, er møguleiki fyri at verða settur í fast starv.

**Kambsdalur**

| FHS: | HH: |
|---|---|
| Fø C 8 t/v | Da A 6 t/v |
| Sálarfrøði og tænasta 1 t/v | Mentunarfatan C 4 t/v |
| Dekoratión 3 t/v | Fø A 8 t/v |

**Førleikakrøv:**
Prógv frá handilsháskúla, lærdum háskúla, handilsfaklæraraprógv ella onnur við øðrum fortreytum. Umsøkjarar við vinnuroyndum hava fyrimun.

**Setanarkor til fast starv:**
Fyrstu 2 árini verða roknað sum royndartíð. Tann, sum settur verður í fast starv, má vera til reiðar skjótast gjørligt at fara undir kravda námsfrøðiliga útbúgving. Lærarar, sum settir verða í fast starv, mugu rokna við í ávísan mun at skula undirvísa á fleiri stigum og partvís um kvøldið gerst tað neyðugt.

**Løn:**
Í lønarrensli 13/21/24, 18/26/29, 16/21/29/31 hjá HL ella eftir avtalu.

**Umsókn fast starv:**
Umsókn við ljósprentum av próvskjølum o.ø., skulu stílast til Føroya Handilsskúla, stýrið og sendast til Føroya Handilsskúla á Kambsdali, 530 Fuglafjørður og verða skúlanum í hendi 24. juni 2002. Umsóknarblað fæst á skúlanum.

**Umsókn tímalærari:**
Umsókn við ljósprentum av próvskjølum o.ø., skulu stílast til Føroya Handilsskúla, stýrið og sendast til Føroya Handilsskúla á Kambsdali, 530 Fuglafjørður og verða skúlanum í hendi 24. juni 2002. Umsóknarblað fæst á skúlanum.

Nærri fæst at vita við at venda sær til deildarstjóran á telefon nr. 444900

*Á Føroya Handilsskúla fevnir frálæran um FHS-støðisár, Hægri Handilsskúla, stakroyndir, Merkonom, Datanom, Teldustøðingaútbúgving, HD 1. part, peningastovnaskúli og útboðin/umbiðin skeið.*

FØROYA HANDILSSKÚLI

Í BÝIN
- HVØNN HÓSDAG